Mistøkini kosta

Magni á Lakjuni noyddist út, tá ið 2. hálvleikur var hálvrunnin. Hann hevði koykt fótin, og so loysti systkinabarnið, Bárður á Lakjuni, hann av. Bárður orsaka av skaða bara vant í tvær vikur. Tað verður ikki roknað við, at skaðin hjá Magna fer at halda honum uttanfyri næsta vikuskifti.

Magni fekk gult kort, tí hann segði dómaranum, at hann hevði verið ov einvísur í dømingini av nærdystunum.

– Vit stóðu okkum væl í 1. hálvleiki. Trupulleikin er, at vit ikki skora upp á møguleikarnar. Vit hildu, at ein gøtumaður í tí eina førinum bjargaði við ælboganum, men tað helt dómarin ikki. Eftir steðgin sóu vit, at persónlig mistøk kosta meiri í bestu deildini, enn tey kosta í næstbestu deildini, staðfestir Magni á Lakjuni.

-jh

Goymdu okkum ov nógv

Poul Ennigarð er tann av gøtumonnunum, sum hevur verið longst á GÍ liðnum. Hann staðfestir, at teir góvu uppat at spæla, tá ið teir vóru komnir framum 1–0.

– Vit tóku okkum ov langt aftur. Í steðginum tosaðu vit um, at vit skuldu flyta spælið longri fram, at vit skuldu bjóða okkum til, og at vit ikki skuldu vera so strongdir, tá ið vit fingu bóltin. Tað eydnaðist væl.

Hvussu ber tað til, at teir fingu seinna málið?

– Sovorðin mál síggjast ofta í sjónvarpinum. Ein lumpuslig sending, sum allir hyggja eftir og hugsa um, hvør fer at broyta kósina á bóltinum. Og so endar hann í málinum. Tíbetur fingu vit trý stig, og so skal man ikki klaga, staðfestir 26 ára gamli GÍ veteranurin.

-jh

ÍF hevur vunnið tvær ferðir

Leygardagin endurtóku vit GÍ heimasíðuna, sum segði, at ÍF hevði ongantíð vunnið á GÍ í landskappingardysti í bestu deildini. Tað áttu vit ikki at havt gjørt uttan at havt kannað málið.

Sannleikin er tann, at ÍF hevur vunnið tvær ferðir á GÍ í landskappingardystum. Fyrra ferðin var 21. september í 1980, tá ið úrslitið í Gøtu var 3–0 til ÍF. Seinna ferðin var 5. juni í 1988, tá ið ÍF á heimavølli vann 1–0 á GÍ. Vit biðja lesararnar og ÍF halda okkum til góða, at vit ikki eftirkannaðu GÍ tíðindini, áðrenn tey vórðu endurgivin.

jh

Gøtumenn illa sperdir

Hóast fuglafirðingar taptu í Gøtu, so bendir einki á, at ÍF ger skjótt av í bestu deildini

Mynd: Álvur Haraldsen

Hóast ÍF tapti í Gøtu, so bar einki boð um, at uppflytararnir ætla sær at gera skjótt av í bestu deildini

GÍ–ÍF
Jóannes Hansen

Góði stimin hjá gøtumonnum heldur fram. Í bólkaumfarinum í steypakappingini fingu teir fult, og ímóti ÍF vunnu teir í fyrsta umfarinum í landskappingini. Seinna umfarið vóru teir góða løtu omaná, og tá løgdu teir seg framum 3–1, og harvið tóktist tað sum um, at eingin ivi var um sigurin. Men ÍF kom afturíaftur. Áki Petersen minkaði um munin við frísparki úr stórari fjarstøðu, sum Hallur Hansen í GÍ málinum átti at havt vart fyri. So trýsti ÍF, men GÍ verjan helt tørn.

Av at vera í fyrsta umfarinum var fótbóltsspælið avgjørt ikki so galið. Tað var ferð á, tað var tætt, og hóast bóltførleikin ikki altíð var sannførandi, so hekk fótbóltsspælið í løtum væl saman.

Uppflytararnir úr Fuglafirði vóru ikki farnir út um Eiðið fyri at spæla tindasvínafótbólt. Eftir eitt lítið korter fekk heimaliðið hol á. Eftir diagonalsending úr høgru, smeyg Súni Olsen sær til baklinjuna í vinstru, royndi flatt og úr spískum, og Poul Arni Jacobsen syrgdi fyri, at verjuspælarin ikki slapp framat, og so var 1–0.

So tók ÍF yvir, og teir vóru omaná restina av fyrra umfarinum. Hanus Eliasen var hangandi álopsspælari aftanfyri Magna á Lakjuni og Bartal Eliasen. Tá ið bólturin kom fram til teirra, tóktist GÍ ferð eftir ferð at rilla.

ÍF javnaði eftir stóran hálvan tíma. Eftir horna úr vinstru kom bólturin út frá aftur til Magna á Lakjuni. Hann lyfti innfyri aftur, Hallur royndi at jústa, men bólturin datt fyri føturnar á Rúna Elttør, sum mitt fyri og sjey metrar úr málinum fluktaði í kassan. Næstu løtuna hevði ÍF fleiri møguleikar. Roy ruddaði væl á miðjuni, og fleiri ferðir komu Magni og Eyðolvur ígjøgnum í høgru. Bartal stútaði eftir horna í tvørtræið, og eftir horna blokeraði ein verjuspælari við ælboganum roynd hjá Árna Petersen úr heilt stuttari fjarstøðu til nýtt horna. Tá vildu fuglfirðingarnir hava dómaran at bríksla fyri brotssparki, men tað gjørdi hann ikki.

Popczynski í stuttum tjóðri

GÍ var meiri tendrað eftir steðgin. Í 1. hálvleiki hevði miðvøllurin ikki verið serliga sannførandi. Popczynski, sum var í stuttum tjóðri, leitaði sær eftir steðgin longri aftur fyri at taka lut í myndandi partinum. GÍ megnaði kortini ikki at spæla seg til nógvar upplagdar møguleikar, men teir høvdu stóra úrtøku.

Eftir ÍF miss í uppspælinum legði Magnus Skoralíð innfyri úr vinstru, og við handara stólpan var Hans Pauli Petersen púra leystur, tá ið hann tveitti seg fram og stútaði til 2–1. Vitus Kofoed varð skiftur inn, men hann gjørdi ikki tær stóru skreytirnar. Magnus Skoralíð, sum spældi við størri sjálvsáliti enn áður, átti eisini sín lut í 3–1 málinum. Eftir innlegg frá honum beindi Kartin Joensen bóltinum út til horna. Tað varð stútað á tvørtræið, og Popczynski var fyrstur á returinum.

So tóktist heimasigurin vísur. Men Áki Petersen minkaði um munin til 3–2, og tað hevði einki forgjørt verið, um ÍF hevði havt fingið eitt stig. Gøtumenn høvdu marginalirnar á sínari síðu, og harvið eru teir framvegis ósigraðir í hesum kappingarárinum.

GÍ–ÍF 3-2 (1–1)

1–0: Súni Olsen 13.
1–1: Rúni Elttør 32.
2–1: Hans Pauli Petersen 62.
3–1: Krzystof Popczynski 85.
3–2: Áki Petersen 88.
Dómari: Petur Skarðenni
GÍ: Hallur Hansen – Leivur Hansen, Poul Ennigarð, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen – Hans Pauli Petersen, Súni Olsen, Símun Louis Jacobsen (Jónreid Dalheim, 84.), Magnus Skoralíð – Krzystof Popczynski, Poul Arni Jacobsen (Vitus Kofoed, 67.)
Gult kort: Eingin
ÍF: Kartin Joensen – Árni Petersen, Viggo Johannesen, Áki Petersen, Rúni Elttør – Eyðolvur R. Petersen, Roy Róin (Teitur Joensen, 75.), Fritleif í Lambanum – Magni á Lakjuni (Bárður á Lakjuni, 66.), Hanus Eliasen, Bartal Eliasen
Gult kort: Magni á Lakjuni 29., Fritleif í Lambanum 82.

Skerdir Klaksvíkingar

Tað hevur ofta vístseg, at næstbestu klaksvíkingarnir hava trupult at manna lið til útidystirnar, og soleiðis var eisini hesaferð.

Í Havn var talan mest sum um Olgar Danielsen og so eina rúgvu av ungum leikarum, men leingi sá út til, at hetta skuldi verða nóg mikið. Olgar var í øllum førum maðurin, sum tíðliga í dystinum legði gestirnar framum, men eftir at KÍ stutta løtu seinni fekk mann riknan av vølli, var tað B36, sum tók alt meira yvir.

Og í seinna hálvleiki eydnaðist eisini heimaliðnum at vissa sær sigurin. Tórður Hentze syrgdi fyri útjavnandi málinum, og nakað seinni var Tórálvur Poulsen á rætta staðnum. Hetta megnaðu klaksvíkingar ongantíð av álvara at hótta, og tá teir ikki áttu skiftisleikara fyri skaddan mann seint í dystinum, endaðu teir høvuðsstaðarvitjanina við nníggju leikarum.

-jm

B36-KÍ 2-1 (0-1)

0-1: Olgar Danielsen
1-1: Tórður Hentze
2-1: Tórálvur Poulsen

Flaggdagsrenningin 2004

Eins og vant, so varð aftur í ár skipað fyri flaggdagsrenningini, og luttakaratalið hesaferð var metstórt

RENNING
jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Eingin flaggdagur uttan flaggdagsrenning. Soleiðis hevur tað verið í skjótt nógv ár, og soleiðis var eisini í góðveðrinum sunnudagin, tá ikki færri enn 440 luttakarar høvdu teknað seg til árligu renningina.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, setti renningina, og sum vera man, sum fegnaðist hann um, at somikið nógv fólk vóru við í einum somikið heilsugóðum tiltaki, sum renning nú einaferð er.

Hann helt fyri, at mannakroppurin er ikki skaptur til at sita á endanum allan dagin, men at hann tvørturímóti skal rørast, og at renningin er eitt framúr høvi til hetta.

Og runnu. Ja, tað gjørdu tey. Summi fyri at kappast, um at vera fremst, onnur fyri at kappast móti sær sjálvur, og uppaftur onnur runnu bara fyri at renna.

Øll høvdu tey í hvussu so er eina góða løtu, og niðanfyri verða úrslitini hjá rennarunum prentað.

440 fólk – 170 fleiri enn gamla metið - tóku lut á árligu flaggdagsrenningini, sum varð avgreidd í fagrastu líkindum sunnudagin

Úrslit frá flaggdagsrenningini 2004

Menn Pláss	Fornavn Eftirnavn	Føddur	Min	Sek
1	Sam Vang	1970	24	15
2	Regin Zachariasen	1960	24	16
3	Guttorm Sørensen	1968	24	20
4	Jonhard Larsen	1966	24	32
5	Evald við Garð	1972	24	37
6	Jóan Karl Joensen	1987	24	53
7	Snorri Paturssson	1979	24	54
8	Sigurð B. Justinussen	1967	24	57
9	Cecil Weihe	1965	25	12
10	Eyðtór J. Joensen	1967	25	47
11	Jósvein Herup Olsen	1958	26	0
12	Hjalti Gunnarstein	1961	26	5
13	Trygvi Hansen	1966	26	19
14	Freddie Poulsen	1971	26	27
15	Eli J. Christiansen	1985	26	32
16	Álvur F. Christiansen	1989	27	3
17	Jens Sørensen	1976	27	3
18	Sámal H. Debes	1952	27	9
19	Jónálvur Johannesen	1974	27	13
20	Súni Jacobsen	1967	27	43
21	Dorian Petersen	1968	27	48
22	Hans Petur Weihe	1967	27	49
23	Olaf Olsen	1967	27	51
24	Regin I. Jakobsen	1966	27	52
25	Djóni Ziska	1965	27	53
26	Steindor Hjaltalin	1949	27	55
27	Andrass Joensen	1963	28	28
28	Jógvan Johan Lorenzen	1980	28	32
29	Óla Jákup Kristoffersen	1959	28	38
30	Bogi Joensen	1973	28	46
31	Steingrímur R. Hansen	1988	28	56
32	Henry Olsen	1964	29	16
33	Ólavur Herup Olsen	1943	29	18
34	Ivan Kjær Christoffersen	1973	29	21
35	Petur Even Djurhuus	1963	29	31
36	Sigurd Vatnhamar	1965	29	37
37	Jóanis Erik Køtlum	1965	29	41
38	Dia Jacobsen	1977	29	44
39	Borgar Biskopstø	1962	29	45
40	Kári Simonsen	1959	29	47
41	Jákup-Alberg Berg	1963	29	52
42	Robert Vilhelmsen	1951	29	55
43	Arnhold Olsen	1981	30	3
44	Jan Jakobsen	1964	30	6
45	Beinir Rasmussen	1972	30	28
46	Gunnar í Liða	1960	30	30
47	Evald Rasmussen	1956	30	31
48	Janus Petersen	1959	31	1
49	Michael Feldballe	1973	31	7
50	Barry Richards	1979	31	12
51	Krisjan Christiansen	1952	31	15
52	Kristin Rasmussen	1952	31	33
53	Harry Hansen	1938	31	38
54	Tummas Justinussen	1990	31	42
55	Jóannes Nolsøe Petersen	1964	31	49
56	Jógvan Olsen	1956	31	54
57	Claus Madsen	1983	32	2
58	Ólavur Kjølbro	1977	32	6
59	Rógvi Thorsteinsson	1961	32	8
60	Dánjal Samuelsen	1969	32	9
61	Bárður Johannesen	1989	32	14
62	Kim Pagels	1957	32	18
63	Páll L. Nólsoy	1965	32	30
64	Bent Tommy Linklett	1963	32	32
65	Henning Clemens Poulsen	1951	32	37
66	Palli Petersen	1965	32	43
67	Niels Hansson	1964	32	51
68	Kenneth Munkebæk	1969	33	7
69	Rói Nolsøe	1966	33	17
70	Ali Celebi	1963	33	20
71	Bogi Olsen	1973	33	45
72	Asbjørn Mikkelsen	1956	33	48
73	Hjalgrim Samuelsen	1964	33	49
74	Sofus Hansen	1969	33	52
75	Uni Petersen	1965	34	24
76	Hans Birgir Hansen	1949	34	36
77	Sølvi Ragnarsson	1978	34	43
78	Eyðun Mørkøre	1971	34	43
79	Heini Gaard	1973	34	57
80	Peter Gram	1959	35	5
81	Martin Olsen	1989	35	6
82	Símun Joensen	1961	35	12
83	Brian S. Jensen	1965	35	16
84	Suni Petersen	1956	35	18
85	Jón Johansen	1963	35	20
86	Júst í Túni	1986	35	25
87	Allan Skaalum	1963	35	25
88	Rune Trabjerg	1982	35	26
89	Boði Haraldson	1961	35	30
90	Herluf Jacobsen	1963	35	32
91	Petur Amon Dalbø	1967	35	34
92	Haldur Súni Johanesen	1963	35	35
93	Sonni Jensen	1958	35	43
94	Jákup Egil Jensen	1960	35	45
95	Páll H. Vesturbú	1961	35	51
96	Líggjas Høgnesen	1963	36	12
97	Høgni Olsen	1980	36	14
98	Jón Kragesteen	1960	36	15
99	Tommy Jensen	1953	36	27
100	Volmar Højgaard	1957	36	34
101	Regin Jóanesarson	1945	36	40
102	LamhaugeIngi	1980	36	41
103	Pauli Djurholm	1965	36	54
104	Djóni á Boðanesi	1975	36	54
105	Robert Thomasen	1969	36	59
106	Peter Mouritsen	1980	37	10
107	Ib Hjersing Skoubo	1961	37	11
108	Klaus Kristensen	1960	37	33
109	Jón Eli Ole Jacobsen	1979	37	38
110	Bjarke Sørensen	1982	37	42
111	Odd Arild Bjellvåg	1965	37	43
112	Sørin Christiansen	1956	37	45
113	Ronni Fornitz	1983	37	50
114	Andrias Jacobsen	1960	37	59
115	Andreas Christiansen	1983	38	1
116	Hans Pauli Strøm	1956	38	10
117	Mortan A. Carlsen	1958	38	14
118	Michael Thomsen	1967	38	20
119	Rúni Heðinson Johannesen	1967	38	39
120	Eivind Danielsen	1955	38	40
121	Høgni Lauritsen	1978	38	57
122	Poul Geert Hansen	1962	39	3
123	Leif Olsen	1958	39	15
124	Ingi Vestergaard	1958	39	15
125	Álvur Oknadal	1957	39	42
126	Jákup Jóanesarson	1968	39	43
127	Mogens Eriksen	1962	39	44
128	Tróndur Leivsson	1957	39	48
129	Óli Simonsen	1957	40	0
130	Óla Hans A. Olsen	1956	40	4
131	Páll Beder1953	40	18	
132	Andru Poulsen	1990	40	26
133	Jørgen Jacobsen	1955	40	34
134	Niels Juul Knudsen	1967	40	35
135	Palli Mortensen	1961	40	41
136	Hans Pauli Johannesen	1990	40	51
137	Tórður Poulsen	1969	41	8
138	Hans Dam	1960	41	14
139	Helgi á Fløtti	1950	41	16
140	Rúni Klein Joensen	1974	41	17
141	Janus Isfeldt	1965	41	18
142	Peter Østergaard	1960	41	43
143	Mikkel Secher	1983	41	49
144	Niels Christian Nolsøe	1958	42	0
145	Súni Danielsen	1965	42	17
146	Martin Sømark	1967	42	18
147	Hannis Wardum	1967	42	43
148	Pætur Bærentsen	1951	43	43
149	Eyðun Hansen	1967	43	50
150	Henrik Lopdrup	1975	43	52
151	Rógvi Jacobsen	1969	45	3
152	Høgni Djurhuus	1948	45	17
153	Martin Joensen-Næs	1961	45	53
154	Heri Petersen	1971	46	17
155	Magni Dalsgaard	1951	46	18
156	Ingolf Joensen	1964	46	37
157	George Poulsen	1970	47	6
158	Ingibjartur Madsen	1935	49	39
159	Jens Marius Poulsen	1942	49	49
160	Hans Jákup Langaard	1966	49	54
161	Eyðfinn Joensen	1966	50	47
162	Oskar Neshamar	1953	51	1
163	Pól Adrian Poulsen	1963	53	5
164	Pætur Háberg	1955	53	24
165	Ásmund Johannesen	1943	54	45
166	Jón Á. Ásgeirsson	1955	55	13
Kvinnur				
1	Jenny Svabo	1990	30	32
2	Linette Giessing	1968	30	41
3	Brynhild Absalonsen	1980	32	7
4	Sunnuvá Bjarnastein	1968	32	38
5	Anna Herup Høgnesen	1983	32	56
6	Tina T. Johannesen	1974	33	14
7	Sølvá Árnadóttir	1977	33	25
8	Óluva Zachariasen	1967	33	50
9	Ann Thomsen	1966	33	51
10	Katrin Rubek Nielsen	1970	34	18

Framhald á síðu 28